## Talvið hesa vikuna

**Bruzon,L (2652) - Topalov,V (2757)**
Corus A Wijk aan Zee (8. umfar), 23.01.2005

**1.e4 c5 2.Rif3 e6 3.d3 Ric6 4.g3 g6 5.Bg2 Bg7 6.c3 Rige7 7.0—0 0—0 8.Re1 e5 9.Ria3** (Topalov helt eftir talvið, at betur var at leika a3 og síðani b4) **9...d6 10.Be3 b6 11.Fd2 Bg4 12.h3 Bxf3 13.Bxf3 Fd7 14.Bg2 f5** (Svartur hevur ongar trupulleikar, stendur minst javnt) **15.exf5 gxf5 16.f4 Rad8 17.Re2 Fe6 18.Fc2 Fg6 19.Kh2 Kh8 20.Fa4 d5 21.fxe5 Bxe5 22.Bf4 Ff6 23.Bxe5 Rixe5 24.d4 Ri5g6!** (Topalov letur a-finnuna fyri álop, sum eisini sær skilagott út) **25.dxc5 bxc5 26.Rf1 f4!** (Ein finna aftrat!) **27.gxf4 Rif5 28.Fxa7 Fh4 29.Fxc5 Rixf4** (Ringt er at bjarga hvítu støðuni. Fyri at gera ilt verri, er kubanin eisini í svárari tíðneyð) 30.Rd2 Rixh3! 31.Fc7 (Ikki hjálpir at leika: 31.Bxh3 Fg3+ 32.Kh1 Fxh3+ 33.Kg1 Rg8+ vinnur] **31...Rd6 32.Ric2** (32.Rxf5 bjargar heldur ikki hvítum, orsakað av 32...Rif4+ 33.Kg1 Fe1+ 34.Bf1 Rg6+) **32...Fg3+ 33.Kh1**



**Støðumynd eftir 33.Kh1**

**33...Rh6!** Og Bruzon gavst. Besti kjansur er 34.Fxg3, men eftir 34...Rixg3+ og 35...Rixf1 hevur svartur rók meir. Ómetaliga gott telvað av Topalov, sum revsaði heldur passivu telving Bruzons
**0—1**

# Klaksvíkingar hava undanvind

**Eftir stórsigrar til oddaliðini í 8. umfari, er tað greitt at kappingin um FM nú bert stendur millum Klaksvík og Havnina**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Klaksvíkingar vórðu undir stórum trýsti frá hvalvíkingum í vikuskiftinum, men fingu kortini heili 3,5 stig burturúr á teimum fýra borðunum.

Rógvi W. Rasmussen heldur fram við góðari telving og úrslitum. Ein relativt skjótur javnleikur við svarta fólkinum móti Heina Olsen, eigur ein at vera nøgdur við. Tað frættist úr Hvalvík, at støðan var rættiliga kompliserað tá teir tóku javnt.

Talvið á 2. borði varð nokkso skiftandi. Ólavur Simonsen misti finnu tíðliga í talvinum móti Finnbjørn Zachariassen, men fann síðani eyðkenda taktiska álopsstílin, sum hevur ligið í dvala heldur leingi, fram aftur og vann loksins.

Finnbjørn Vang og Martin Brekká høvdu fullkomiliga javna støðu, tá Martin knappliga setti rók sín í deyða. Finnbjørn takkaði fyri og vann sjálvsagt talvið. 7,5 stig av 8 hevur Finnbjørn nú ognað sær sjálvum og klaksvíksliðnum.

Tað sá einki serligt út hjá Rana Nolsøe í talvinum ímóti Kára Petersen. Men við eitt varð Kári óneyvur og Rani sló til og setti Kára skák og mát.

Eitt rimmar úrslit hjá klaksvíkingum, sum nú vónaðu at kollfirðingar kundu gera okkurt við nærmastu kappingarneytarnar úr Havnini.

### Eingin hjálp frá kollfirðingum

Men nei. Kollfirðingar fingu bank sunnudagin. Við Martin Poulsen á odda, vunnu havnarmenn heili 3,5-0,5.

Martin Poulsen vann á øðrum sinni í landskappingini á Hans Kristian Simonsen. Føroyameistarin frá 2002 hevur ikki havt eitt gott kappingarár, meðan Martin hinvegin er trygg-leikin sjálvur í ár. Tríggir sigrar og fýra javnleikir er úrtøka hansara higartil.

Torbjørn Thomsen varð einasti kollfirðingur sum fekk stig sunnudagin, tá hann leikti javnt móti Olaf Berg. 3-4. borðini hjá havnarmonnum, Bogi Ziska og Helgi D. Ziska, vunnu á ávíkavist Eyðálvi Johannesen og Bernhardi Thomsen

Við sigrinum eru havnarmenn framvegis hálvttriðja stig aftanfyri klaksvíkingar.

Dysturin millum toftamenn og vestmenningar er útsettur til komandi vikuskiftið.

### Endaumførini og NM

Í 9. umfari hitta havnarmenn vestmenningar, meðan klaksvíkingar taka ímóti kollfirðingum. Vónandi heldur spenningurin sær til seinasta umfar, tá oddaliðini bresta saman. Stríðið um bronsuna er eisini spennandi. Hvalvíkingar liggja bestir fyri, men vestmenningar kunnu koma ájavnir teimum, um teir vinna stórsigur í útsetta dystinum móti toftamonnum.

Orsakað av, at Norðurlandameistaraskapurin fyri unglingar verður 18-20. februar í Oslo, er tíggjunda og seinasta umfar í liðkappingini framskundað til leygardagin 12. februar.

Venjingarlega fyri føroysku NM-luttakararnar verður eins og í fjør á Hotel Vágum komandi vikuskiftið. Talvsambandið hevur sett svian IM Emil Hermansson sum venjara fyri okkara bestu unglingar.

### Topalov á odda

Í superstórmeistarakappingini í Wijk aan Zee, Hollandi, er bulgarin Veselin Topalov einsamallur fremstur eftir átta umfør. Hann hevur eitt nú vunnið á Vladimir Kramnik og sunnudagin vann hann enn eitt flott álopstalv móti yvirraskilsinum úr Kuba, Lazaro Bruzon, sum óvæntað lá í toppinum undan talvinum móti Topalov. Talvið er við í blaðnum.

Eftir ringar kappingarbyrjanir, hava Kramnik og Viswanathan Anand nú telvað seg heitar og eru við í toppstríðnum.

### Støðan í Wijk aan Zee

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Topalov | (2757) | 5,5/8 |
| 2 | Leko | (2749) | 5,0 |
| 3 | Adams | (2741) | 5,0 |
| 4 | Anand | (2786) | 5,0 |
| 5 | Grischuk | (2710) | 4,5 |
| 6 | Kramnik | (2754) | 4,5 |
| 7 | Short | (2674) | 4,0 |
| 8 | Bruzon | (2652) | 4,0 |
| 9 | Ponomariov | (2700) | 4,0 |
| 10 | Polgar | (2728) | 3,5 |
| 11 | van Wely | (2679) | 3,5 |
| 12 | Svidler | (2735) | 3,0 |
| 13 | Sokolov | (2685) | 2,5 |
| 14 | Morozevich | (2741) | 2,0 |

## Úrslit og støður

### 1. deild

8. umfar

| | | |
|---|---|---|
| Hvalvík | Klaksvík | 0,5-3,5 |
| Rógvi W. Rasmussen | Heini Olsen | 0,5-0,5 |
| Finnbjørn Zachariassen | Ólavur Simonsen | 0-1 |
| Martin Brekká | Finnbjørn Vang | 0-1 |
| Kári Petersen | Rani Nolsøe | 0-1 |
| | | |
| Toftir | Vestmanna | Útsettur |
| | | |
| Kollafjørður | Havnin | 0,5-3,5 |
| Hans Kristian Simonsen | Martin Poulsen | 0-1 |
| Torbjørn Thomsen | Olaf Berg | 0,5-0,5 |
| Eyðálvur Johannesen | Bogi Ziska | 0-1 |
| Bernhard Thomsen | Helgi D. Ziska | 0-1 |

### Støðan

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 24,5 |
| 2. Havnin | 22,0 |
| 3. Hvalvík | 16,0 |
| 4. Kollafjørður | 12,5 |
| 5. Vestmanna | 12,0 |
| 6. Toftir | 4,0 |

GG: Vestmanna og Toftir hava leikt ein dyst færri enn hini liðini

# Fimm føroyingar til Reykavíkar

**Seinast í hesum mánaðinum skulu fimm føroyskir svimjarar taka lut í altjóóða kapping í Reykjavík**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Í samband við at Reykjavík tekur nýggja innandura svimjihøll í nýtslu, verður stór international svimjikapping í døgunum 28, 29 og 30 jan.

Íslendingar hava bjóða svimjarum ymsastaðni frá til hesa stórhending í Reykjavík, og vísir tað seg at svimjarar koma úr Bretlandi, Luxemburg, Svøríki, Noreg, Íslandi og Føroyum.

Henda svimjihøll í liggur í Laugardali í Reykjavík er nakað heilt serligt. Tann stóri svimjihylurin er 50m langur og 25m breiður so høllin kann nýtast bæði til kappingar á lang- og stuttbana. Kappingin sum føroyingar fara til verður á langbana.

Svimjararnir úr Føroyum verða: Sára Ejdesgaard úr Tvøroyrar Svimjifelag, Andrass Thomsen úr Havnar Svimjifelag, Elspa Mørkøre og Karina Petersen úr Fuglafjarðar Svimjifelag, og Kristian Olsen úr Ægir í Klaksvík.

Hetta er samstundis liður í fyrireikingunum til Oyggjaleikirnar, sum verða í Hetlandi í summar. Higartil hava omanfyrinevndu svimjarar klára kravtíðirnar til Oyggjaleikirnar.

Kappingin er skipa í tveimum bólkum, 16ár og eldri, og 15ár og yngri.

Sigast kann at tann eini bretin ið kemur at luttaka hevur bretskt met í 1500 frí svimjing, og luttók hann til OL2004, eisini verður norska Theresa Alshammer ið somuleiðis luttók til OL síðsta ár við í kappingini í Reykjavík, so tað má sigast at støði verður høgt.

Andrass Thomsen verður verandi í Íslandi eftir kappingina, hann hevur gjørt avtalu við svimjifelagið Ægir í Reykjavík, og kemur hann næstu mánaðirnar at venja hjá Íslendska Ungdómslandsliðsvenjaranum, í fyrsta umfarið fram til FM í svimjing sum verður í mai.




*Elspa Mørkøre hevur veruliga gjørt um seg seinastu tíðina, og hon er við á liðnum, sum nú skal royna seg í Reykjavík*

Aðrir føroyskir svimjarar hava fyrr roynt seg hjá Ægir í Reykjavík við góðum úrslitum, talan er um Kristian Martin Joensen og Dia Jacobsen.

Ferðalagið fer til Íslands fríggjadagin 28 januar og koma tey aftur mánadagin 31 januar.